## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur. Sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís kavi. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og kavaælingur, seinnapartin minni vindur av norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum –1 og +2 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar, men eisini kavaælingur. Hitalagið millum –2 og +1 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot av norði, seinni av ymsum ættum og yvirhøvur turt.Hitalagið um frostmarkið. Týsdagin frískur vindur av útsynningi og regn. Lýggjari.



# Smyril aftur í regluliga sigling í kvøld

Í kvøld verður Smyril settur aftur í vanliga rutusigling ímillum Suðuroy og Havnina og síðani verður siglt eftir vanligu ferðaætlanini.

Tað upplýsir Conrad Gaard Joensen, rakstrarleiðari á Strandferðsluni.

Brekið, sum týskvøldið førdi til, at skrúvan koplaði úr so at Smyril misti framdriftina, varð staðfest ímeðan hann lá við bryggju á Krambatanga og tað varð umvælt í gjár.

Samtundis vórðu trygdarskipanir settar í fyri at fyribyrgja, at hetta ikki hendir aftur.

Ímeðan Smyril lá við bryggju í Suðuroy, vóru skipanirnar royndar í verki og tá ið tær vístu seg at halda til trýstið, varð avgjørt at lata Smyril sigla til Havnar í morgun.

Men fyri at geva fólki møguleika at koma til skipið, var fráferðin útsett frá klokkan 7 í morgun til klokkan 8.30.

Men tá ið teir baksaðust við tað tekniska brekið ímeðan Smyril lá á Trongisvágsfirði, komu teir fram á aðrar ábøtur, sum tað var ynskiligt at gera, áðrenn siglingin verður tikin upp aftur av álvara.

Eykalutirnir, sum skulu brúkast til tær ábøturnar, eru hjá El-service á Skála og tí er avrátt, at ábøturnar skulu gerast ímeðan Smyril liggur í Havn í dag.

Av tí sama varð fráferðin úr Havn klokkan 9.30 avlýst og somuleiðis verður túrurin av Krambatanga klokkan 15.30 í dag, heldur ikki sigldur.

Men Smyril verður klárur aftur til regluliga túrin úr Havn í kvøld klokkan 18.30 og síðani verður aftur siglt eftir vanligu ferðaætlanini í morgin og framyvir.

**-aki**

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -7 |
| Nuuk | -6 |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | -6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 14 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 10 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 5 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 7 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 18 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 15 |
| Malta | 18 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 3 |
| New Dehli | 24 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | -- |
| New York | 12 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 27 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 971 hPa. skamt sunnan fyri Føroyar fer eystureftir og grynnist.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Hetland fer spakuliga eystureftir og vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av landnyrðingi móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/11 kl. 06[00] – 25/11 06[00]. Hitin í gjár: 5,3°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° -
Mesti hiti máldur í oktober: +18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 24/11 kl. 06[00] – 25/11 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 74 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

22. november Mánin longst frá jørðini
24. november Fyrra kvarter
2. desember Fullmáni
4. desember Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26.nov | 01:43 | 14:01 | 00:43 | 13:01 | 00:58 | 13:16 | 03:43 | 16:01 | 04:43 | 17:01 | - | 12:16 | 11:16 | 23:34 | 01:58 | 14:16 | 02:58 | 15:16 | 01:28 | 13:46 | 02:43 | 15:01 |
| 27.nov | 02:19 | 14:38 | 01:19 | 13:38 | 01:34 | 13:53 | 04:19 | 16:38 | 05:19 | 17:38 | 00:34 | 12:53 | 11:53 | - | 02:34 | 14:53 | 03:34 | 15:53 | 02:04 | 14:23 | 03:19 | 15:38 |
| 28.nov | 02:57 | 15:17 | 01:57 | 14:17 | 02:12 | 14:32 | 04:57 | 17:17 | 05:57 | 18:17 | 01:12 | 13:32 | 00:12 | 12:32 | 03:12 | 15:32 | 04:12 | 16:32 | 02:42 | 15:02 | 03:57 | 16:17 |
| 29.nov | 03:38 | 16:00 | 02:38 | 15:00 | 02:53 | 15:15 | 05:38 | 18:00 | 06:38 | 19:00 | 01:53 | 14:15 | 00:53 | 13:15 | 03:53 | 16:15 | 04:53 | 17:15 | 03:23 | 15:45 | 04:38 | 17:00 |
| 30.nov | 04:23 | 16:47 | 03:23 | 15:47 | 03:38 | 16:02 | 06:23 | 18:47 | 07:23 | 19:47 | 02:38 | 15:02 | 01:38 | 14:02 | 04:38 | 17:02 | 05:38 | 18:02 | 04:08 | 16:32 | 05:23 | 17:47 |